# Tekniski skúli 75 ár



**Í dag eru 75 ár síðan Tekniski Skúli í Havn byrjaði sítt virksemi. Sum skilst verður meira gjørt burtur úr hesum seinni. Í dag sjálvan føðingardagin vilja vit ynskja skúlanum tillukku við at greiða eitt sindur frá søgu skúlans, og við eini frásøgn frá námsferð til Íslands fyri kortum**

GREINANAVN
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Fyrsti rættuligi handverkara- ella arbeiðsskúli, vit vita um her á landi, er hann sum var settur á stovn av Tillich amtmanni. Ein lærari var Magnus Jacobsen úr Baianstovu, abbi Magnus á Kamarinum

Tað fyrsta, sum kann kallast tekniski skúli í Føroyum, var fingin í lag av amtmanninum Buchwald. Her lærdu næmingarnir at tekna og byggja hús. Ein kendur næmingur var Djóni í Geil, sum seinni teknaði kommunskúlan, sum nú er ráðhús í Havn. Hann framvegis ein tann prýðiligastu bygningur í Føroyum.

Í 1908 var aftur ein roynd gjørd at skipa tekniskan skúla í Havn, og var tað Magnus á Kamarinum, sum stóð á odda. Ein lærari var eisini Jógvan Waagstein Men heldur ikki hesi skúli gjørdist drúgvur. Árini 1920-1926 varð aftur roynt við tekniskum skúla. Lærarar tá vóru Steingrim Winther, byggimeistari og H.C.W. Tórgarð arkitektur. Hesir skúlar fingu ikki almennan studning, og tí vóru teir so stuttlívaðir.

Í 1932 byrjar danin Ernst Hansen tekniska kvøldundirvísing á Tvøroyri. Um sama mundi varð Havnar Handverksmeistarafelag stovnað. Felagið fekk tá skriv frá stjóranum fyri teknisku undirvísingini í Danmark, at hann hevði hug at koma til Føroyar at hjálpa til, um áhugi var fyri tekniskum skúla í Havn.

Hesum tók felagið undir við. Formaður í handverks meistarafelagnum var Johannes Simonsen, múrarameistari. Aftaná væl fyriskipaðar fyrireikingar gjørdar av Vilhelm Nielsen, smiðjumeistara, Stengrim Winther byggimeistara og Chr Bach, sum var stjóri á elverkinum á Rundingi, varð tann 10. november 1934 samtykt at seta á stovn tekniskan skúla. Hesin dagur er tískil roknaður at vera stovningardagurin hjá skúlanum. Men longu ein viku frammanundan var lýsing í Dimmalætting, sum boðaði frá, at Tórshavnar Tekniski skúli byrjar um miðjan november. Áhugaðir næmingar skuldu venda sær til Johannes Simonsen seinast 10. november, stovningardagin hjá skúlanum.

Longu í februar árið eftir varð skúlin statsgóðkendur og harvið tryggjaður statsstuðul, sum var 40% av útreiðslunum.

Tey bæði fyrstu árini var Johannes Simonsen eisini leiðari á skúlanum. Eftir hann var Zacharias Sørensen, yvirlærari í Havn, ættaður av Kirkju, leiðari fram til 1945.

Skúlin hevði gott samband við danskar myndugleikar og fekk góðan stuðul frá teimum og eisini frá donskum feløgum innan handverk og ídnað. Millum annað bað handverksmeistarafelagið eisini um hjálp úr Danmark til at fáa skipaðar sveinaroyndir í Føroyum.

Í Danmark var nýggj lærlingalóg komin í 1937, men ein tilsvarandi lóg kom ikki í Føroyum fyrr enn í 1954. Tískil máttu sveinaroyndir skipast eftir donsku lógini, hóast umstøðurnar vóru sera ymiskar.

Í 1956 gjørdist tekniski skúlin sjálvsognarstovnur. Inntil tá hevði skúlin verið kvøldskúli. Men áhugin fyri at fáa handsverksútbúgving vaks so nógv seinast í 50-unum, og við hesum gjørdist eisini tørvur á dagskúla. Hann byrjar í 1956 sum eitt fimm-mánaðarskeið fyri næmingar av bygd. Hetta riggaði væl, og tað vísti seg, at næmingarnir fingu meira burturúr á dagskúla enn á kvøldskúla.

Næsta stigið var at samskipa alla tekniska undirvísing í dagskúla í Havn og seinni eisini í Klaksvík.

### Hølisviðurskifti

Skúlin fekk fyrst innivist í húsunum hjá Jens Paula í Dali undir Pisuvarða, og frá 1935 í táverandi sjómansskúlanum við J.C. Svabosgøtu, sum Tórshavnar Kommuna átti, og sum Skipasmiðjan eigur nú.

Her var skúlin í 10 ár, men tað var sera trongligt. Í 1945 bjóðar kommunan skúlanum at húsast í VBV húsunum við Skansavegin. VBV stendur fyri Vandbygningsvæsenet. Studentaskúlin skuldi vera har um dagin og tekniski skúlin um kvøldið. Hetta var ikki besta loysn, men skúlin hevði einki val.

Men so hendi tað í 1956, at Føroya Banki fór at byggja nýggj bankahús. Meistarafelagið fekk arbeitt so væl, at teir kundu keypa gomlu húsini hjá bankanum, og hetta gjørdist tekniski skúlin í mong ár.

### Týdningarmikil lærustovnur

Tað er ikki meira sum kann sigast sum søguna á hesum sinni. Tekniski skúli er í dag ein týðandi táttur í skúlaverkinum. Her eru deildir fyri tey ymisku økini, sum handverkið fevnir um, sum bildeild, eldeild, hárfríðkanardeild, maskindeild, timburdeild og smiðjudeild.

Hendan dagin vit vóru á vitjan hildu teir, at 300 næmingar vóru á skúlanum. Men samlaða næmingatalið fyri árið er munandi hægri. Lærlingar eru bert ein part av lærutíðini á skúlanum, og tá teir verandi næmingar fara út koma aðrir inn.

Hetta sigur nakað um hvussu týðandi tað er, at skúlin hevur góðar umstøður.

Vit ynskja skúlanum tillukku við hesum merkisdegi við ynski um góða eydnu framyvir.

**Skúlastjórar hava verið:**
Johannes Simonsen
Zacharias Sørense
Steingrim Winther
Johan Ziska
Poul Kjartan Bærentsen
Svenning Nielsen
1997- Egon Øregaard

## Tekniski Skúli á námsferð í Íslandi

Um mánaðarskiftið september/oktober skipaði Smyril Line fyri ein nógv umrøddan túr til Íslands í fótasporum fiskimanna.

Men hendan túrin hjá Norrønu vóru eisini aðrir bólkar við øðrum ørindum í Íslandi. Millum hesar vóru tríggir flokkar á tekniska skúla við 17 næmingum og trimum lærarum.

Ørindini vóru ein námsferð, har teir vitjaðu Alcoa Fjarðaál, tað stóra aluminiumsverkið á Eysturlandinum og Landsvirkjun, tað